## 646 næmingar í 1. flokk

Nú fólkaskúlin byrjar aftur eftir summarsteðgin, fara 646 næmingar í skúla á fyrsta sinni. Hetta vísir eitt yvirlit frá Mentamálaráðnum. Flestu næmingarnir – 42 - verða í 1. flokki í nýggja skúlanum við Løgmannabreyt í Hoyvík, og næstflestir í Venjingarskúlanum – 38. Skúlin við flest næmingum er Kommunuskúlin við sínum 507 næmingum.



## Skúlin á Sandi liðugur uttan

Tað gongur væl við byggingini av nýggja barnaskúlanum heima á Sandi. Skúlin er nærum heilt liðugur uttan, og innan eru menn í ferð við at bjálva og pláta bygningin. Í hesi vikuni fara teir at seta skilarúm upp innan. Arbeitt hevur verið í skúlanum nærum alt summar. Tað var bert ein vika, hvar skúlin stóð manntómur, skrivar bkv.fo.

# einar deyðsfellur

garðarnar lutfalsliga nýggir.

Við tummastokki er skjótt at síggja, at hæddin á reiggjunum í hvørgum av støðunum var teir 35 cm, ið eru minsta krav, sambært donsku lóggávuni, frá undirlagið upp til brettið at sita á. Hol vóru í hegninum í báðum støðum, og fleiristaðni stungu seymir og skrúvur út. Hetta var eisini á støðum, tey minstu eisini røkka til. Rot var í viðinum ymsastaðni. Men tað, sum kann metast sum tað mest sannlíka hjá børnunum at fáa skaða av, vóru føroysku bátarnir í báðum støðum. Báðir eru hægri enn 60 cm – uml. 160 cm og 130 cm har teir eru hægstir – og tað sær ikki út til at vera trupult hjá børnunum at koma upp frá hinum síðunum, men ongin girðing er í toppunum. Av hesi orsøk høvdu teir neyvan verið góðkendir á spæliplássum í Danmark. Hesi spæliplássini eru als ikki nøkur eindømir og ikki alt tað ivingarsama er tikið fram her.

### Nóg trygt

- Um eg hyggi at spæliplássunum í Sunda kommunu mangla fasilitetir, men eg meti at trygdin er heilt góð. Eisini haldi eg, at samanborið við Danmark hava vit nógv størri og betri økir, sum eru innhegnaði. Harafturat hava vit altíð starvsfólk úti í garðinum, tá børnini eru har, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Sunda kommunu um støðuna á spæliplássunum á barnagørðunum í kommununi, sum Sosialurin vitjaði í gjár.

- Eg havi fult álit á, at starvsfólkini eru nóg góð trygd hjá børnunum, so eg meti at børnini undir núverandi karmum eru børnini eru nóg trygg í barnagørðum okkara, tí sjálvandi er altíð onkur sum dettur, men tann møguleikin er altíð til staðar, greiðir Heðin Zachariasen frá.

Heðin Zachariasen metir eisini, at danir hava eina nógv øðrvísi hugsan enn føroyingar, tá talan er um avbjóðingar til børnini.

- Tað ber ikki til, at børnini bara skulu ganga á sløttum asfalti. Tað er sera týdningarmikið í menningini av øllum motorikki hjá børnum, at tey sleppa at royna seg. Tí mugu vit ikki undirmeta frælsi hjá børnunum. Bæði tað likamliga og tað sálarliga, sigur Heðin Zachariasen.

- Sjálvandi skulu vit liva frameftir og ikki aftureftir, men vit mugu heldur ikki gloyma fortíðina. Tí er tað sjálvandi rætt, at vit hava føroyskar bátar á spæliplássunum, og teir eru grivnir nakað niður í undirlagið eisini fyri at minka um hæddina. Vit mugu eisini minnast til, at fyrr var øll bygdin okkara spælipláss, og ongin ansaði eftir okkum, so tíðirnar eru broyttar, men báturin er ein týdningarmikil partur av okkara arvi, svarar Heðin Zachariasen til spurningin um bátarnar á spæliplássunum, sum ongantíð høvdu verið góðkendir í Danmark, um ongin girðing var um tað hægsta á stýrhúsinum.

- Vit vaksnu mugu ikki gera tað soleiðis, at børnini onki tora og onki sleppa. Tí hetta minkar stórliga um menningina hjá teimum og eg eri fullvísur í, at okkara spælipláss eru trygg, men vit mangla kanska nakrar fasilitetir. Men ikki alt verður bygt eftir einum degi, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Sunda kommunu

Sosialurin hevur roynt at fingið fatur í Kristinu Háfoss, landsstýriskvinnu í mentamálum, ið umsitur hetta økið, men hetta eydnaðist ikki, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Føroysku bátarnir, ið eru á flestu spæliplássum í Føroyum, eru sum oftast nógv hægri enn danir meta forsvarligt*



*Høgt er upp í tornið í Hvalvík, og stigin upp í tað, hevði ikki verið góðtikin eftir danskari lóggávu*



*Í hesum skreiðibana eru skrúvurnar ikki nóg langt inni*